# Tey lokalu byrjaðu showið

**Tá prix semifinalan fór av bakkastokki í Trongisvági leygarkvøldið, vóru tað tvey lokal andlit, ið fóru fyrst á pall**

**PRIX 2005**
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Tvey lokal andlit komu fyrst á pall, tá semifinalan í Prix Føroyar kappingini fór fram í Trongisvági leygarkvøldið.

Jákup Magnussen, kendur útvarpsmaður, er av Tvøroyri og var sostatt á heimavølli, hóast hann í gerandisdegi sínum heldur til í Havn.

Hann hevur verið frásøgumaður øll umførini í ár, eins og undanfarin ár.

Hann kundi bjóða einum øðrum lokalum navni á pall. Jonhild Andreasen Nielsn, sangarinna og fyrrv. prixluttakari, setti í eginleika av forkvinnu í mentarnarnevnd Tvøroyrar Býráð prix tiltakið leygarkvøldið.

Hon fegnaðist m.a.um, at prixið kom á vitjan suðureftir, so suðuroyingar eisini fingu høvi at vera við og at hoyra, og so onnur eisini fingu høvi at vitja suðureftir. Og tá tey bæði fóru av palli, var klárt til tøttu finaluna í Trongisvági.



*Jákup Magnussen og Jonhild A. Nielsen*

*Mynd: D.Olsen*

# Svf sendi beinleiðis

**Leygarkvøldið sendi Svf beinleiðis úr Suðuroynni og tað hendir ikki á hvørjum degi. Tað hendi seinast til kommunuvalið fyri 8 arum síðani. Men enn er nakað eftir á mál tøkniliga, innan tøkningarnir hjá Svf eru nøgdir við sendimøguleikarnar, kaðalstyrki og annað tílíkt**

**SVF OG PRIX**
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Svf bussurin var hjartað í myndaframleiðslu og hevði eisini leiðsluna um hendi viðvíkjandi hvør skuldi á og av nær leygarkvøldið. T.d. stýrdu teir eisini Jákupi Magnussen, frásøgumanni.

Á kommunuvalinum fyri 8 árum síðani sendi Svf beinleiðis úr Suðuroynni. Síðani er tað ikki hent.

Men nú hevur Svf fingið hendur á tøkni, sum ger tað møguligt at senda beinleiðis og tað gjørdi Svf um vikuskiftið. Høvið var prix semifinalan í Trongisvági, men eisini onnur innsløg og sendingar hava verið beinleiðis, t.d. kjak og Mentanartíðindi.

Bæði Úf og Svf høvdu riggað sendiútgerð og sendibussar til uttanfyri høllina á Tvøroyri. Hetta er samstundis fyrsta prixumfar hesaferð, sum er beinleiðis í Svf, tí hini hava bert verið at sæð á netinum.

Men sambært tøkningunum í Svf bussinum leygarkvøldið, so er enn nakað á mál, innan tað eru nøktnadi umstøður tøkniliga at arbeiða undir, hóast tað í dag ber til at senda beinleiðis.

- Tá vit fyri 8 árum síðani sendu beinleiðis frá kommunuvalinum, so høvdu vit 800 telefonlinjur. Nú hava vit eina og alt er digitalt komprimerað. Men góðskan er ikki hin allar besta, tí møguleiki er bert fyri at senda við 2 megabitt og 4 hevði verið betur og 8 er ysnkilgt. Vit hava lænt tveir kassar, sum senda og móttaka. Hetta er útgerð, ið kostar eini 170.000 krónur. Fyribils er hetta lænt, men kanska hon veður keypt, søgdu tøkngingarnir í Svf bussinum vónríkir leygarkvøldið; Bjarnheðin í Hoyvík, Rúni Kjær og Herluf Sørensen.



*Hetta var fyrsta ferðin í ár, at SvF hevur seint beinleiðis frá Prix'num*

*Mynd: Álvur Haraldsen*